## Felag í verkætlanarleiðslu stovnað

**Felag fyri fólk, sum arbeiða við verkætlanarleiðslu, varð stovnað fríggjadagin. Føroyska felagið er deild av donskum landsfelag**

Felag fyri fólk, sum arbeiða við verkætlanarleiðslu í Føroyum, varð stovnað í Havn fríggjadagin.

Fólk, sum arbeiða við verkætlanarleiðslu hittust á kunningarfundi á Føroya Tele seinnapartin fríggjadagin. Eftir fundin varð føroysk deild av danska landafelagnum formliga stovnað, og nevnd varð vald. Triggir nevdarlimir vóru valdir fyri tvey ár, og tveir fyri eitt ár í fyrsta umfari. Soleiðis slepst undan, at øll nevndin verður skift út í senn.

Eini 25-30 fóolk umboðandi ymisk feløg og stovnar vóru á fundi, og tá felagið var stovnað, høvdu 14 fólk teknað seg sum lim. Stigtakararnir siga, at teir vænta størri undirtøku sum frálíður.

Í fyrstu nevndina, sum skipaði seg á fundi seinnapartin mánadagin, komu Árni Jakobsen, umboðandi verkfrøðingafelagið Sofus M. Jakobsen, Kári Dahl Christiansen, Føroya Tele, og Regin V. Dalsgaard, Isuus Mobil, sum vórðu valdir fyri tvey ár. Umframt teir vórðu Sigurd Lamhauge, Norðoyartunnilin, og Súni Christiansen, Landsverk, valdir fyri eitt ár.

ej

# Umlegging í samráð við starvsfólkið

**Umleggingin av vaskiarbeiðinum á Landssjúkrahúsinum, sum umrødd er aðrastaðni í blaðnum, verður gjørt í samráð við starvsfólkið, sigur fakfelag teirra**

UMLEGGING
*Edvard Joensen*

Vaskingin á Landssjúrkahúsinum skal skipast eftir norðurlendskum normi, har mált verður, nær eitt sjúkrahús er nóg reint, samstundis sum finnast skal fram til, um onnur arbeiði enn bara vasking kunnu gerast av teimum fólkunum, sum dagliga halda Landssjúkrahúsið reint.

Á Landssjúrkahúsinum eru tey farin undir eina verkætlan saman við teimum fólkunum, sum vaska sjúkrahúsið og Havnar Arbeiðskvinnuelag, sum er fakfelag teirra. Verkætlanin skal ætlandi standa við til jólar, sigur Jan á Argjaboða, sum hevur ábyrgdina av ætlanini.

Tey, sum dagliga vaska Landssjúrkahúsið, eru fyri tann allarstørsta partin fastlønt fólk, umframt nøkur heilt fá tímalønt, sum brúk er fyri av og á.

Ætlanin er aat fáa sum mest arbeiðið til teirra, sum fastlønt eru, og helst fáa skipað tað soleiðis, at tey kunnu fáa eitt arbeiði burturúr, sum tey kunnu liva av, sigur Jan á Argjaboða.



*Tey, sum vaska gongirnar á Landssjúrkashúsinum, skulu nú hava betri skipað arbeiðsviðurskifti, sum verða roynd í eini verkætlan hetta fram til jóla*

Sum er arbeiða fleiri teirra som mikið fáar tímar, at tað verður ikki full vika burtuúr. Til dømis møta tey um morgunin og fara so heim aftur mitt á degi fyri síðan at koma aftur um kvøldið.

– Hetta er sjálvandi ikki nøktandi, sigur Jan á Argjaboða, og tí vilja vit eisini finna út av, um til ber at finna onnur arbeiði, sum hesi somu fólkini kunnu gera ta tíðina, tey annars skuldi gingið heima og bíða aftir at koma út aftur at taka arbeiðið uppaftur.

Vaskiarbeiðið á Landssjúrkahúsinum var eisini rakt av sparingum í nítiárunum, og síðan tá er líkasum eingin, sum hevur nortið nakað við hetta aftur, sigur Jan á Argjaboða. Nú er so ætlanin at skipa tað eftir einum felags norðurlendskum standardi, har mett verður um, hvat kann gerast og nær eitt sjúrkahús er nóg reint. Brúktir verða ávísir fastir formlar so at siga til at staðfesta hetta, sigur hann.

Vígdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, sigur, at felagið alla tíðina hevur verið kunnað um verkætlanina, sum gjørd verður í samráð við arbeiðsfólkið.

Hon væntar ikki, at hetta kemur at ganga út yvir teirra limir, sum teir allarflestu eru fastløntir har úti. Tó við lægri løn, enn tey kundu ynskt sær.

– Tá fólk hava arbeitt meira enn tríggjar mánar á Landssjúrkahúsinum fleiri enn 15 tímar um vikuna, gerast tey av sær sjálvum fastlønt, sigur hon. So koma nøkur tímalønt aftur at soleiðis av og á, tá brúk er fyri tí. Hesi verða nú færri, men aftur fyri verður meira varandi arbeiði til hini, sum eru fastlønt, sigur hon.

# Byggir í Mykinesi

**Í Mykinesi standa í løtuni eini sethús í gerð. Tað er ein miðvingur, sum er fluttur í oynna at vera uppsitari, ið byggir**

ÚTOYGGJ
*Edvard Joensen*



*Í løtuni er Kjell Nattestad úr Miðvági í ferð við at byggja í Mykinesi*
Mynd: Eddie Lauritsen

Miðvingurin Kjell Nattestad er so glaður fyri at vera í Mykinesi, at hann er farin undir at byggja í oynni.

Langt er ímillum, at sethús verða bygd í Mykinesi. Men fyri nøkrum árum síðan bygdu Katrina Johannesen, sum er úr Mykinesi, og Esbern í Eyðansstovu úr Sandavági í bygdini. Og nú er annar vágamaður farin at byggja har úti.

Kjell Natestad sigur, at honum dámar væl at ferðast í náttúruni og at fáast við kríatúr. Og bæði tvey fær hann í ríkiligt mát í Mykinesi, so hann hevur gjørt av at verða verandi har úti.

Hann hevur ikki nakað fast at koma til soleiðis, sigur hann. Røktar á Borgardali fyri onnur. Og so fæst hann eitt sindur við at venja hundar fyri fólk.

– Talan er um seyðahundar, leggur hann dent á. Border Collie hundar, sum fólk annaðhvørt kunnu senda mær út í oynna at venja, ella hvølpar frá mær sjálvum, sum eg venji og selji fólki.

Tað nyttar tó ikki at koma við puddelhundum, schefarum ella øðrum hundum av ymsum uppruna. Tað tekur hann ikki upp á seg, sigur Kjell Nattestad.

Men hetta við at selja hvølpar undan egnari tík, er rættiliga avmarkað, tí hann hevur bara eina tík, og hon hevur bara lagt einaferð, sigur hann.